| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 25. januar 2018 |
| Býráðsfundur nr. | 01/2018 |
| Borgarstjóri | Sonni á Horni |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2018 tann 25. januar kl. 19.00 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 18. januar 2018 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**

Sonni á Horni
Kristian Petersen
Ólavur Larsen
Árant Berjastein
Magni Herason Jøkladal
Sigurð S. Simonsen
Eyðun á Lakjuni
Edva Jacobsen
Maria á Boðanesi

Eivin Breiðaskarð á lista F hevur boðað frá, at hann vegna forfall ikki kann møta á fundinum, og hevur biðið um, at varalimur kann møta á fundinum í hansara stað. 1. Varalimurin Jonn S. Thomsen hevur ikki møguleikar fyri at møta og heldur ikki 2. varalimur Steintóra Hansen Nesá. Við tað at tað er staðfest, at tað stendur á jøvnum í atkvøðum 25 í part um 3. varalimin millum Mariu á Boðanesi og Eileen Jákupsdóttir Ejdesgaard, so hevur kommunuvalnevndin framt lutakast á fundi 17. januar 2018. Valið fall á Mariu á Boðanesi sum 3. varalim og Eileen Jákupsdóttir Ejdesgaard verður sostatt 4. varalimur.

Samtykt varð einmælt, at Maria á Boðanesi tekur sæti á býráðsfundinum sum varalimur fyri Eivin Breiðaskarð.

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, kommunustjóri

**Mál nr. 01/2018.**

**Leigusáttmáli við P/F Vónina.**

Vinnunvendin hevur móttikið uppskot frá fyrisitingini, dagfest 10. januar 2018 til leigusáttmála við P/F Vónina av grundøki undir nýggja nóta- og trolvirkinum, sum bygt verður á Enninum, og sum sambært góðkenningarskrivi frá Umhvørvisstovuni hevur matr. nr. 239ao.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í vinnunevndini 11. januar 2018, og mælir nevndin býráðnum til, at leigusáttmáli verður gjørdur sambært fyriliggjandi uppskoti.

**Avgerð:**
Tilmæli frá vinnunevndini varð samtykt. (9-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 19.10.

Kristian Petersen
Árant Berjastein
Magni Herason Jøkladal
Ólavur Larsen
Eyðun á Lakjuni
Sigurð S. Simonsen
Edva Jacobsen
Maria á Boðanesi
Sonni á Horni

Skrivari:

Jákup Frants Larsen